Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 30.05.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
**Nevndarlimir:** Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
**Varalimir:**
**Ikki møtt:**
**Onnur:** Rúni Rasmussen, kommunustjóri
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 37/24 | 24/00633-1 | Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2023 |
| 38/24 | 24/00523-2 | Sundurbýti - matr.nr. 1590, Klaksvík |
| 39/24 | 24/00510-2 | Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 324a og 324b |
| 40/24 | 24/00381-2 | Dagføring av leiguøkjunum hjá P/F Looknorth - matr.nr. 92 og 163ab |
| 41/24 | 24/00364-4 | Byggisamtyktarbroyting fyri matr.nr. 667, 668, 669, 670, 671, 712a, d, g og j, Klaksvík |
| 42/24 | 22/00649-21 | Innilokan og útbyggjan av rætt hjá Ognarhaganum í Árnafirði |
| 43/24 | 24/00531-18 | Tilmæli um eykajáttan til at skifti graslíkið við Djúpumýru – *seinna viðgerð* |
| 44/24 | 23/01278-2 | Umsókn um stuðul - hækkað upphædd pr. íbúgva 2024 - Visit Norðoy – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 45/24 | 24/00042-29 | Eykajáttan í samband við barnaransingartilboð til barn við serligum tørvi – *seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 46/24 | 23/00721-6 | Tilboð - fíggjarlig binding í 2025 |
| 47/24 | 23/00336-33 | Umvæling av býráðshúsinum - støðutakan til tilboð |
| 48/24 | 21/01280-308 | Leigugjald |
| 49/24 | 21/01301-34 | Keyp av lendi |
| 50/24 | 21/01316-43 | Søla av lendi |
| 51/24 | 24/00580-1 | Grót |

**Til viðgerðar**

## 37/24
## 24/00633-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.05.2024 | 34/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 37/24 |

**24/00633-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2023**

**Frágreiðing um málið:**
Her er uppskot til roknskap og protokoll, sum grannskoðarin hevur sent okkum.

Roknskapurin er í tráð við mánaðarligu kunningina av nýtslu í mun til játtan. Vit hava nú flutt løgustuðulin og løgujáttanina til Mentanarhúsið (3 mió. kr.) frá íløgum til rakstur. Har eru nakrar útreiðslurn komnar aftrat, m.a. avseting ísbv gerðarrættarmálið.

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna.

Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

Sambært § 46 í kommunustýrislógini, skal býráðið eisini taka støðu til val av grannskoðara.

Í samband við fíggjarliga partin verður víst til s. 11 í ársroknskapinum (fíggjarstøða).

Víst verður eisini til hesar talvur í protokollini: 4.1.6 eykajáttanir, 4.1.7 roknskapartøl 2016-2021, 4.1.8 nýtslan í mun til játtan, 4.1.10 lyklatøl, 4.2.7 langfreistað skuld.

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.
Sambært § 46 í kommunustýrislógini, skal býráðið eisini taka støðu til val av grannskoðara.

**Stutt um roknskapin**
Roknskapurin vísir 1,5 mió. kr. í avlopi áðrenn avdráttir.

Inntøkurnar eru 344,5 mió. kr., rakstur 272,5 mió. kr., íløgur 55,6 mió. kr., rentustuðul 6,1 mió. kr. og fíggjarpostar 9,2 mió. kr.

Áogn hjá skuldarum og skattaeftirstøðum v.m. er 4,8 mió. kr, áogn hjá Gjaldstovuni 38,2 mió. kr. og innistandandi 15 mió. kr.

Bankaskuldin er hækkað 13,5 mió. kr. Lán eru upptikin fyri 23,8 mió. kr., og onnur lán niðurgoldin við 10,3 mió. kr.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Lánini hava samband við yvirtøku av Atlantis (3,7 mió. kr), og at 20 mió. kr. eru trektar av láninum upp á 40 mió. kr., sum kommunan tók í januar 2023 í Banknordik.

| | | | Broytingar 2023 | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Lán (1.000) | 31-12-2022 | 31-12-2023 | Broyting | Lántøka | Avdráttir |
| BKN 6383515 | | -19.695 | 19.695 | 19.695 | |
| BKN 6329022 | -25.000 | -25.000 | 0 | 0 | |
| BKN 6316915 | -24.995 | -25.005 | 9 | 9 | |
| BKN 5695661 | -18.850 | -17.550 | -1.300 | | -1.300 |
| F. Lívstrygging P/F\|77-11( | -4.206 | -2.717 | -1.489 | | -1.489 |
| BETRI 5079235 | -31.733 | -29.859 | -1.874 | | -1.874 |
| BETRI 5494453 | -7.067 | -6.611 | -456 | | -456 |
| BETRI 5548413 | -23.247 | -22.121 | -1.126 | | -1.126 |
| BETRI 5604542 | -41.828 | -39.071 | -2.757 | | -2.757 |
| NSP - Lán skuld ísbv NBH | -14.479 | -14.562 | 83 | 83 | |
| NSP 3109733 - Lán | -26.801 | -25.207 | -1.595 | | -1.595 |
| NSP 3175604 - Biskupstc | -12.496 | -12.571 | 74 | 74 | |
| NSP 3227981 - Lán | -32.848 | -33.040 | 192 | 192 | |
| NSP 3239149 - Lán | -21.518 | -21.605 | 87 | 87 | |
| NSP 3287283 - Lán | | -60.240 | 60.240 | | 60.240 |
| Umflokking innistandan( | -60.000 | | -60.000 | | -60.000 |
| NSP 3314132 lán ísbv Atlantis | | -3.716 | 3.716 | 3.716 | |
| | | | | | |
| Lán ultimo | -345.069 | -358.568 | 13.499 | 23.855 | -10.356 |
| | | | | | |
| Broyting netto jan - des | | | | | 13.499 |

Lániskuldin er 358,5 mió. kr., kreditorar 30,9 mió. kr. og onnur skuld 10,5 mió. kr.
Nettoskuldin er 341 mió. kr., sum er 6,1 mió. kr. undir loyvda skuldarmarkið.

**Lógargrundarlag:**
§ 46. Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal veljast.
Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.

§ 53, stk. 2, 1) roknskapurin skal verða landsstýrinum í hendi innan 1. juni eftir endað fíggjarár.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Roknskapurin 1,4 mió. kr. í avlopi áðrenn avdráttir.
Bankaskuldin er 358 mió. kr., og d.d. er skuldin hækkað til 372,6 mió. kr.
Nettoskuldin er 6,1 mió. kr. undir eina álíkning.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

Verður undirskrivað á býráðsfundinum.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2024:**
Nevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
Grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2023 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll einmælt góðkendur.
Harumframt einmælt samtykt at lata SPEKT halda fram sum grannskoðari kommununnar.

**38/24**
**24/00523-2 Sundurbýti - matr.nr. 1590, Klaksvík**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 22.05.2024 | 61/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 38/24 |

**24/00523-2 Sundurbýti - matr.nr. 1590, Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til umsókn, dagf 29-04-2024, um sundurbýti av matr.nr. 1590 við Heygaveg 24 i Klaksvík.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarligar ásetingar:
- økispartur: A10
- minsta mark grundøki: 200 $m^2$ fyri økið vestanfyri Nólsoyar Pálsgøtu og sunnanfyri Fjósabrekku
- ábygging í mesta lagi: 35%




**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 - Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Almenna Byggisamtyktin
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Ætlaða sundurbýti liggur innanfyri karmarnar í byggisamtyktini. Mælt verður tí til at viðmæla umsóknini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 22. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-05-2024.

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
Tilmælið frá UBN 22-05-2024 einmælt samtykt.

# 39/24
# 24/00510-2 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 324a og 324b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 22.05.2024 | 60/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 39/24 |

## 24/00510-2 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 324a og 324b

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 324a og 324b í Lávíkunum.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarliga liggja báðar ognirnar í økiparti A5, har minsta mark grundøki er sett til 300 $m^2$:
Matr.nr. 324a er í dag 174 $m^2$ og matr.nr. 324b 188 $m^2$. Báðar ogninar eru sostatt niðanfyri galdandi minsta mark grundøki.
Við umskipanini minkar matr.nr. 324a við 20 $m^2$, meðan matr.nr. 324b veksur tilsvarandi.
Ábyggingarstigið á minna stykkinum verður verandi innanfyri galdandi áseting.




**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál.11: Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

**Lógargrundarlag:**
Almenna Byggisamtyktin
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Umsøkta marknaumskipan er ikki í tráð við ásetingarnar í byggisamtyktini um minsta mark grundøki, men stuðlar hinvegin undir kravið um parkering á egnum stykki.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Tekniska Umsiting mælir tí til viðmæla marknaumskipanini, og harvið játta frávik frá kravinum um minsta mark grundøki út frá nevndu grundgeving.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 22. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-05-2024.

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
Tilmælið frá UBN 22-05-2024 einmælt samtykt.

## 40/24
## 24/00381-2 Dagføring av leiguøkjunum hjá P/F Looknorth - matr.nr. 92 og 163ab

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 22.05.2024 | 63/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 22.05.2024 | 18/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 22.05.2024 | 33/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 27.05.2024 | 47/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 40/24 |

**24/00381-2 Dagføring av leiguøkjunum hjá P/F Looknorth - matr.nr. 92 og 163ab**

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi dagf. 14. mars 2024 biður P/f Looknorth um at fáa framt matrikul-tillagingar av leiguøkjum teirra, matr.nr. 92 og 163ab á vestara havnalagi.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Viðv. økinum sunnanfyri matr.nr. 163ab:
Millum eldra bygningin hjá Looknorth og "Dávavirkið" lá uppprunaliga ein 6 metra breiður kommunalur geiri. Tann 24. apríl 2013 játtaði býráðið at selja "Dávavirkinum" helvtina av hesum geiranum (breidd 3 m), samstundis sum keyparin var kunnaður um, at bygging ikki fór at vera loyvd á selda økinum.

Tekniska Umsiting sær fyri sær, at hin helvtin av geiranum kann verða løgd afturat matr.nr. 163ab (leiguøkið hjá Looknorth) við somu treyt um bygging, sum sølan til "Dávavirkið", og at kommunan - um tørvur verður á tí - til eina og hvørja tíð skal kunna sleppa framat ánni.

Viðv. kommunala økinum vestanfyri Looknorth (eldra) og millum báðar Looknorth-bygningarnar:
Umsókta umskipan er ein dagføring av veruligu viðurskiftunum á staðnum, við tað at Looknorth longu fyri árum síðani hevur fingið byggiloyvi og hevur bygt millumbygning á økinum.




**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Árliga leiguinntøkan fyri matr.nr. 163ab veksur við uml. kr. 2000,- og fyri matr.nr. 92 kr. 1200,-

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi mælir Tekniska Umsiting til at játta umsóknini um regulering av matr.nr. 163ab og 92.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 22. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-05-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 22. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 22-05-2024

**Tekniska Nevnd 22. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 22-05-2024.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við TN 22-05-2024.

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
Tilmælið frá FíN 27-05-2024 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# 41/24
# 24/00364-4 Byggisamtyktarbroyting fyri matr.nr. 667, 668, 669, 670, 671, 712a, d, g og j, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 21.05.2024 | 42/24 |
| 2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 21.05.2024 | K-9/24 |
| 3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 22.05.2024 | 49/24 |
| 3 Ferðslunevndin | 22.05.2024 | 26/24 |
| 4 Havna- og Vinnunevndin | 22.05.2024 | K-9/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 41/24 |

**24/00364-4 Byggisamtyktarbroyting fyri matr.nr. 667, 668, 669, 670,  671, 712a, d, g, og j, Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Umsókn er komin frá eigarunum av matr.nr. 669, Klaksvík um at byggja íbúðir og harvið broyta byggisamtyktina fyri matrikulin.

Matr.nr. 669 er útlagt sum C2, ið er ætlað til *C2 - Almenn endamál (tróttarøki og mentunnarøki),* ásetingarnar fyri økið loyva ikki privatum íbúðarbygging, uttan tað er bygging ætlað sum sambýli til fólk, ið bera brek.

Byggi- og býarplansbólkurin hevur umrøtt umsóknina og hevur hugt nærri at nýtsluflokkingini í økispartinum C2. Tí C2 er ein stórur økispartur, ið inniheldur nógvar ymiskar nýtslubólkar, t.d. skúlar, ítrótt og annað mentanarligt virksemi.
Umrøtt varð eisini, um verandi ásetingar eru tíðarhóskandi í mun til tørvin av bústøðum og sentralu staðsetingini, og um tað ikki hevði verið skynsamt at umhugsað økið, ið umfatar matr.nr. 667, 668, 669, 670, 671, 712a og j og d sum ein nýggjan økispart, ið letur upp fyri blandaðum íbúðar- og miðstaðarendamálum.
Vert er at hava í huga, at fyri ikki so mongum árum síðan búleikaðust fólk í umtalaða øki, so tað er ikki ókent fyri økið. Mett verður somuleiðis, tað hevði verið hóskandi at fingið meira lív í økið.

Við at stovna nýggjan økispart við nýtsluflokki "miðstaðarendamál" fer hetta at stuðla undir ætlanini at stimbra undir bústaðarmøguleikum í býnum. Byggisamtyktarbroytingin stuðlar undir 1. stig av ætlanini.

Í samband við møguliga byggisamtyktarbroyting av C2 vil umsitingin nýta høvi at rætta uppá skeivleikar, ið eru í verandi mørkum millum økispartarnar C2 og A10. Rætting er farin fram í økinum omanfyri rennibreytina og vegin við Másheyg.




*E6*




*Byggisamtyktarbroyting*



*Verandi byggisamtykt*

Vinaliga sí *E6 uppskot til økisblað*, har eru ásetingarnar fyri nýggja økispartin nærri lýstar. Økisásetingarnar í A10 og C2 verða ikki broyttar.

**<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarligar avleiðingar:**
At lýsa byggisamtyktarbroytingina kostar uml. 5.000-6.000 kr.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at heimila umsitingini at fremja lýstu byggisamtyktarbroyting.

**Mentanarnevndin 21. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-05-2024

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 21. mai 2024:**
Málið verið til kunning.

**Ferðslunevndin 22. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við ferðsluliga partinum av málinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 22. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN 21-05-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 22. mai 2024:**
Tilmælið, dagf. 08-05-2024, verið til kunningar

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
Tilmælið frá UBN 22-05-2024 einmælt samtykt.

## 42/24
## 22/00649-21 Innilokan og útbyggjan av rætt hjá Ognarhaganum í Árnafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 22.05.2024 | 62/24 |
| 1 Árnafjarðarnevndin | 30.04.2024 | 6/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 22.05.2024 | 17/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 42/24 |

**22/00649-21 Innilokan og útbyggjan av rætt hjá Ognarhaganum í Árnafirði**

**Frágreiðing um málið:**
Ognarhagin í Árnafirði søkir um loyvi at inniloka/útbyggja verandi rætt í Árnafirði. Endamálið við útbyggingini er at dagføra og nýmótansgera rættina og harvið betra um umstøður ísb. við seyðahald.

Ætlanin er, at rættin verður minkað úr 24 m niður í 13 m, men breiðkað úr 2,5 m til 5,5 m, og eitt felagshøli verður staðsett í norðara enda. Tann parturin av verandi rætt, ið er timbur, verður burturbeindur. Við hesi útbygging verður talan um eina øking á uml. 10 $m^2$.

Ognarhagin hevur áður søkt um loyvi at útbyggja verandi rætt og tilhaldshús. Umsóknin fekk ikki viðhald, tí kommunan metti, at útbyggingin kundi ávirka framtíðar neystabygging. Samráðst hevur síðani verið um eina “minni” útbyggjan av verandi rætt, ið ikki ger eins stór inntriv í verandi rætt og lendið rundan um. Tí í eini møguligari neystaútstykking verður neyðugt at keypa undirlendi, har verandi rætt stendur og lata endurgjald fyri rætt o.a. Hetta ein av orsøkunum til, hví fyrra umsóknin ikki fekk viðhald.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Um kommunan ikki hevur ætlan at keypa lendi til fremjanina av neystabygging í nærmastu framtíð (1-2 ár), metir umsitingin tað vera skynsamt ímóti haganum at loyva teimum at dagføra og betra um umstøðurnar við ættina.

Ognarhagin hevur møguleika at reisa mál um endurgjald ímóti kommununi sambært løgtingslóg býarskipanir og byggisamtyktir v.m. *§ 14. Tá ið eitt øki samsvarandi byggisamtykt er lagt av til almenn hús ella virki, ella er ætlað til vegir, torg ella annað sovorðið og ognarmaður tess eftir meti metingarnevndarinnar smbr. § 15 <u>missir møguleikan at nýta teir fyrimunir, ið økið hevur á rímiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaøkini í roynd verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka økið fyri endurgjald.</u>*

Verður samtykt at loyva ætlaðu bygging í D-øki, verður álagt Ognarhaganum at senda inn neyðugar tekningar, ið lýsa byggiverkætlanina, og lata kommununi fulltrú vegna hagastýrið.

**<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.
Rættin liggur í økisparti D24, ið er ætlað til neystaøki og kirkjugarð og ikki landbúnanðarvirksemi.

**<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>**
Keyp av lendi og endurgjald fyri rætt verður tikið upp ísb. við neystaætlan.

**<u>Tilmæli:</u>**
Mælt verður til at loyva útbyggjan/dagføring av verandi rætt, um kommunan onga ítøkiliga ætlan hevur um neystabygging í nærmastu framtíð (1-2 ár).

**<u>Árnafjarðarnevndin 30. april 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá fyrisitingini dagf. 23-04-2024.

**<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 22. mai 2024:</u>**
*Oddmar á Lakjuni luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við Árnafjarðarnevndini 30-04-2024.

**<u>Havna- og Vinnunevndin 22. mai 2024:</u>**
*Atli S. Justinussen og Oddmar á Lakjuni luttóku ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 22-05-2024

**<u>Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:</u>**
*Atli S. Justinussen og Oddmar á Lakjuni luttóku ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá Signhild V. Johannesen: *Mælt verður til at beina málið aftur í umsitingina at fáa málið betur lýst, m.a. at fáa eina niðurstøðu frá yvirfriðingarmyndugleikunum, áðrenn støða verður tikin til málið*; tað fall við 3 atkvøðum fyri (SVJ, ASB og TJL) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, GvK, JCC, EÓP, JS og ÓML).

Síðani varð atkvøtt um at geva Ognarhaganum tilsøgn til byggiverkætlanina, at endaligt loyvi ikki verður givið, fyrr enn hagastevna hevur verið, og hagastýrið letur fulltrú vegna eigarnar ísb. við umsóknina um

byggiloyvi; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, GvK, JCC, EÓP, JS, ÓML og TJL) og ongari atkvøðu ímóti; SVJ og ASB atkvøddu ikki.

## 43/24
## 24/00531-18 Tilmæli um eykajáttan til at skifti graslíkið við Djúpumýru – *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.05.2024 | 33/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 16.05.2024 | 36/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 43/24 |

**24/00531-18 Umsókn um nýtt graslíki við Djúpumýru - Klaksvíkar Ítróttarfelag**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 16. mai 2024.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Heimsmál nr. 3: Góð heilsa og vælferð.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Arbeiðið er mett til at kosta 4,6 mió kr. (nýtt graslíki og burturbeining av verandi, gjøgnumgongd og góðkenning av undirlagi og graslíki).
Klaksvíkar kommuna fær stuðul á 600 tkr. frá FSF. Útreiðslan hjá Klaksvíkar kommunu verður 4 mió kr.

Mælt verður til, at útreiðslan verður fíggjað við *tøkum peningi*.

**Tilmæli:**
Mælt verður fíggjarnevnd og býráð at taka støðu til tilmælið.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2024:**
*Tummas J. Lervig og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini vegna ógegni*
Nevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til, at upphæddin á 4 mió kr. verður fíggjað við *tøkum peningi*. Nevndin mælir til, at gamli vøllurin verður burturbeindur beinanvegin.

**Klaksvíkar Býráð 16. mai 2024:**
*Tummas J. Lervig og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini vegna ógegni*
Atkvøtt varð um tilmælið frá FíN, 16-05-2024, tað var samtykt við fyrstu viðgerð, við 6 atkvøðum fyri (JCC, GvK, ASJ, KHJ, JS og ÓML ) og 1 atkvøðu ímóti (ASB), og SVJ atkvøddi blankt.

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
*Tummas J. Lervig og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá Oddmar á Lakuni til fígging: *Mælt verður til at málið verður fíggjað av *600 tkr. frá FSF, *500 tkr. frá Ung í Arbeiði (flyta játtan) og *3,5 mió. kr. frá Fastogn*

*(flyta játtan)*; tað fall við 1 atkvøðu fyri (OáL), 6 atkvøðum ímóti (JS, ASB, JCC, GvK, ASJ og KHJ); SVJ og ÓML atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Jógvani Skorheim: *Mælt verður til at málið verður fíggjað av *600 tkr. frá FSF, *500 tkr. frá §1 (flyta játtan) og *3,5 mió. kr. frá Fastogn (flyta játtan)*; tað fall við 2 atkvøðum fyri (JS og ÓML), 5 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, JCC og ASB); OáL og SVJ atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð síðani um býráðstilmælið frá 16. mai 2024; tilmælið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, JCC, JS og ÓML), 1 atkvøðu ímóti (ASB), og SVJ og OáL atkvøddu ikki.

## 44/24
## 23/01278-2 Umsókn um stuðul - hækkað upphædd pr. íbúgva 2024 - Visit Norðoy – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.04.2024 | 28/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2024 | 24/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 30/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | 44/24 |

**23/01278-2 Umsókn um stuðul - hækkað upphædd pr. íbúgva 2024 - Visit Norðoy**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 24. apríl 2024.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Hetta málið stuðlur uppundir 3. heimsmál at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ein hækking av borgaragjaldinum á 150,- pr. borgara kostar kr. 823.500,- fyri 2024. Ongin avseting er til endamálið.

**Tilmæli:**
Fyrisitingin mælir til, at nevndin tekur støðu til at eykajátta stuðulin til Visit Norðoy við kr. 823.500,-. Verður at játta av *tøkum peningi*.

**Mentanarnevndin 16. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-04-2024

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN 16-04-2024.

**Klaksvíkar Býráð 24. april 2024:**
Tilmælið frá FíN 22-04-2024 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
Tilmælið frá BýR 24-04-2024 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 45/24
## 24/00042-29 Eykajáttan í samband við barnaransingartilboð til barn við serligum tørvi – *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | (24/00042-4) | 12.03.2024 | 18/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | (24/00042-4) | 19.03.2024 | 18/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | (24/00042-4) | 21.03.2024 | 22/24 |
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | | 21.05.2024 | 26/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | | 27.05.2024 | 37/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | | 30.05.2024 | 45/24 |

**24/00042-29 Svar frá Almannaverkinum viðv. markamóti millum Klaksvíkar kommunu og Almannaverkið**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 21. mars 2024, tó við teirri viðmerking, at spurningurin um gjald til Power Care skuldi takast upp við Almannaverkið (sí býráðssamtytina frá 21. mars 2024, skjal 24/00042-18).

**Tilmælið frá 1. mars til mars nevndarumfarið:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt nevndum og býráði til, at rakstrarstaðið "NR Námsfrøðiliga ráðgevingin" fær eina eykajáttan á kr. 547.200, ið verður veitt við *tøkum peningi*.

**Samtyktir frá mars umfarinum:**

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 12. mars 2024:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 01.03.2024.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024, men mælir til at taka spurningin um gjald til Power Care upp við Almannaverkið.

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Tilmælið frá FíN 19. mars 2024 einmælt samtykt.

Í tráð við samtyktirnar frá mars nevndarumfarinum hevur umsitingin tikið spurningin upp við Almannaverkið. Almannaverkið metir seg ikki eiga ella varða av útreiðsluni, sum stavar av Power Care, tað tíðarskeiðið barnið er á dagstovni, hinvegin varða tey av útreiðsluni til Power Care, teir tímarnar barnið ikki er í ansing.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018

§ 6. Avvarðandi kommuna og foreldur rinda tær útreiðslur, sum standast av virkseminum sambært hesi lóg. Foreldragjaldið skal tó í mesta lagi vera 30% av rakstrarútreiðslunum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Viðvíkjandi útreiðslum til Power Care: mett verður, at kostnaðurin av hesum útreiðslum hevur verið kr. 497,50*80 tímar = kr. 19.900.
Námsfrøðiligur stuðul á 25 tímar pr. viku: 189.000 kr. fyri 9 mðr.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt nevndum og býráði til, at rakstrarstað nr. 02211370040 "NR Námsfrøðiliga ráðgevingin" fær eina eykajáttan á kr. 208.900, ið verður veitt av *tøkum peningi*.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 13.05.24.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2024:**
Nevndin tekur undir við B&U 21-05-2024.

**Klaksvíkar Býráð 30. mai 2024:**
Tilmælið frá FíN 27-05-2024 einmælt samtykt, og málið sostatt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

**46/24**
**23/00721-6 Tilboð – fíggjarlig binding í 2025**

**47/24**
**23/00336-33 Umvæling av býráðshúsinum – støðutakan til tilboð**

**48/24**
**21/01280-308 Leigugjald**

**49/24**
**21/01301-34 Keyp av lendi**

**50/24**
**21/01316-43 Søla av lendi**

**51/24**
**24/00580-1 Grót**

*Fundurin lokin kl. 20:45*